# Leiðbeining til tjaldingar- og kampingpláss í Føroyum



Útgevari: SamVit, august 2008

Útgávan er stuðlað av Vinnuframagrunninum

# Innihaldsyvirlit

**1 INNGANGUR ... 2**

1.1 SAMANDRÁTTUR OG NIÐURSTØÐUR ÚR LEIÐBEININGINI ... 2
1.2 STAÐFESTING AV TØRVI ... 3
1.2.1 FERÐANDI TIL FØROYAR ... 4
1.2.2 FERÐANDI Í FØROYUM ... 5

**2 ALMENN LOYVI ... 6**

2.1 KUNNGERÐ UM TJALDING ... 7

**3 SANITER VIÐURSKIFTI ... 8**

3.1 NÁTTHÚS ... 8
3.2 DREKKIVATN ... 9
3.3 REINGERÐ AV FELAGSØKJUM ... 10

**4 NÁTTÚRA OG UMHVØRVI ... 10**

4.1 LEIÐREGLUR FYRI VERND AV NÁTTÚRUNI ... 10
4.2 BURTURKAST ... 11

**5 BÝTIÐ AV TJALDINGAR- OG KAMPINGPLÁSSUM ... 12**

5.1 SLØG AV PLÁSSUM ... 13
5.2 VAL AV STAÐI ... 13

**6 AÐRAR TÆNASTUR ... 15**

6.1 NEYÐUG KUNNING ... 15
6.2 STREYMVEITING ... 16
6.3 SPÆLIPLÁSS ... 16
6.4 SMÁTTUR ... 17
6.5 SØLA ... 17

**7 METING OG FLOKKING AV TJALDINGAR- OG KAMPINGPLÁSSUM ... 18**

7.1 FLOKKING AV SMÁTTUM ... 18

**8 INNLATING AV HAGTØLUM ... 18**

**9 NIÐURSTØÐA ... 19**

**KELDUYVIRLIT ... 21**

**SKJAL 1: TRYGDARVIÐURSKIFTI** ... 22
**SKJAL 2: KRØV TIL NÁTTHÚS** ... 24
**SKJAL 3: KRØV TIL LENDIÐ** ... 25
**SKJAL 4: HEITI Á TEKNUM** ... 26
**SKJAL 5: FLOKKING AV TJALDINGAR- OG KAMPINGPLÁSSUM** ... 27
**SKJAL 6: FLOKKING AV SMÁTTUM** ... 30
**SKJAL 7: DØMI UM TJALDINGAR- OG KAMPINGPLÁSS Á HÆGSTA STIGI** ... 31

# Leiðbeining til tjaldingar- og kampingpláss í Føroyum

## 1 Inngangur

Ferðavinnan er ein alsamt vaksandi vinna í Føroyum og í altjóða høpi. Vøksturin av ferðafólki er øktur í sambandi við, at tað seinastu árini er vorðið lættari at ferðast. Tað er ein stór avbjóðing fyri ferðavinnuna í Føroyum at standa seg í altjóða kappingini um ferðafólkið. Hin tilvitaði ferðandi setir í dag strong krøv til góðsku, trygd, ferðavinnuveiting og uppliving. Megna vit ikki at bjóða hesar tænastur, ja, so velur viðkomandi eitt annað ferðamál næstu ferð. Samanumtikið eru ferðafólk í dag kræsin og eru oftast væl kunnað um ferðamálið frammanundan.

Talið av ferðafólki í Føroyum, sum ferðast um flogvøllin ella sjóvegis, hevur verið vaksandi við metstórum tølum seinastu árini. Ein støðug menning av ferðavinnuni er tí av alstórum týdningi, og neyðugt er, at marknaðarføring og innlendis menning av ferðavinnuni ganga hond í hond. Okkara veitingar mugu, so vítt gjørligt, vera á sama støði sum í londunum kring okkum.

Hendan leiðbeiningin til tjaldingar- og kampingpláss er eitt stig á gongdu leiðini. Høvuðsendamálið við eini tílíkari leiðbeining er at geva kommununum og einstaklingum, sum ætla sær í holt við at veita tænastu innan tjalding og kamping, eitt munagott arbeiðsamboð. SamVit hevur til uppgávu at samstarva við vinnu, kommunur og økisferðavinnufeløg um gongdar leiðir, og hetta er ein liður í at menna eina burðardygga ferðavinnu á hesum øki.

### 1.1 Samandráttur og niðurstøður úr leiðbeiningini

Leiðbeiningin, ið tú nú situr við, vísir á viðurskifti, ið hava týdning fyri at kunna lyfta tjaldingar- og kampingplássini í Føroyum upp á eitt hægri støði, svarandi til tað í londunum rundan um okkum.

Fyri at røkka hesum máli, eigur henda leiðbeining at verða nýtt, tá stig verða tikin til at gera tjaldingarpláss í Føroyum. Leiðbeiningin vísir somuleiðis á týdningin av at kanna og umhugsa viðkomandi viðurskifti, serliga umhvørvislig og fíggjarlig viðurskifti, áðrenn farið verður í holt við at gera tjaldingarpláss. Tjalding og kamping í sær sjálvum hevur nevniliga ikki víst seg at vera ein lønandi vinna og er tískil meira at rokna sum ein tænasta, ið t.d. kommunur bjóða ferðafólki. Samstarv er tí lyklaorðið, um vit skulu koma burtur úr lappaloysnum, ólógligari tjalding og vantandi góðsku á okkara tjaldingar- og kampingplássum. SamVit mælir í hesum sambandi til:

- At kommunur og einstaklingar savna orkuna og gera nøkur fá og góð tjaldingar- og kampingpláss í Føroyum.
- At myndugleikar og vinna, so sum flutningsfeløg, samstarva um gerð av tjaldingar- og kampingplássum.
- At atlit verða tikin til náttúru og umhvørvi, og at plássini verða gjørd so umhvørvisvinarlig sum gjørligt.
- At Føroyar gerast partur av norðulendsku flokkingarskipanini, tí hetta fer at gera arbeiðið munandi lættari bæði hjá veitarum, ferðandi og myndugleika.

Verða tilmælini í hesi leiðbeining fylgd, kann væntast, at grundarlag er fyri munandi vøkstri í tí málbólkinum, sum nýtir hetta slagi av gisting. Hetta gevur so aftur grundarlag fyri, at vinna og myndugleikar kunnu samstarva um at marknaðarføra Føroyar sum eitt áhugavert kamping- og tjaldingarferðamál.

## 1.2 Staðfesting av tørvi

Tørvurin á tjaldingar- og kampingplássum er vaksin munandi seinastu árini. Ein orsøk til vøksturin á hesum bólki av ferðandi er nýggja “Norrøna”, ið hevur møguleika at flyta nógv fleiri kampingvognar enn gamla skipið. Harafturat er talið á føroyingum, ið keypa sær kampingvognar, nógv vaksið.

Í Føroyum eru fleiri tjaldingarpláss. Góðskan er sera ymisk, tí har er eingin miðvís góðskuskipan ella leiðbeining at fylgja. Kommunurnar hava eftirlitsskyldu við tjaldingar- og kampingplássunum, og tað er sera ymiskt, hvussu hendan eftirlitsskyldan verður røkt.

SamVit metir tískil, at tørvur er á eini leiðbeining, har víst verður á, hvørji krøv skulu lúkast, tá farið verður í holt við at gera tjaldingar- og kampingpláss. Hendan leiðbeiningin kann vera við til at tryggja, at hin ferðandi fær á leið somu tænastur og karmar á teimum ymisku tjaldingar- og kampingplássunum í Føroyum.

### 1.2.1 Ferðandi til Føroyar

Sambært Smyril Line, er talið á ferðandi við kamping- og húsvognum økt munandi, síðan nýggja Norrøna kom í 2003. Nágreinilig hagtøl finnast ikki so langt aftur, men niðanfyri síggja vit tølini á kamping- og húsvognum, ið eru komnir til Føroyar við Norrønu í 2006, 2007 og fyrru helvt av 2008.

| **Kamping- og húsvognar við Norrønu**<br>Mai – September | | | |
|---|---|---|---|
| **Ár** | **Kamping- og húsvognar** | **Fólk íalt** | **Fólk pr. vogn** |
| **2006** | 785 | 2.132 | 2,7 |
| **2007** | 609 | 1.982 | 3,2 |
| **2008** | 708<br>(bíleggingar til august 2008) | 1.872 | 2,6 |

Tølini eru fyri akfør, ið eru $\geq$ 2,5m høg ella $\geq$ 2m breið, og tískil bert vegleiðandi.

Flestu kamping- og húsvognarnir vitja í Føroyum í juni, juli og august mánaði. Ein stórur partur av vognunum fara víðari til Íslands og steðga tí bert í Føroyum frá mánadegi til mikudag, um siglt verður úr Hanstholm, og frá fríggjadegi til mánadag, tá siglt verður til Bergen ella Scrabster á heimferðini úr Íslandi.

Størsti parturin av teimum ferðandi, ið koma til Føroya við kamping- ella húsvogni eru vaksin fólk. Í 2007 vóru 90 prosent av teimum ferðandi vaksin fólk, meðan 10 prosent vóru 12 ár og yngri.

Ein alsamt vaksandi partur av teimum ferðandi, sum steðga á í Føroyum við kamping- ella húsvogni, eru bólkar við 10 til 50 vognum og við tveimum fólkum í hvørjum vogni. Bólkarnir ferðast saman og ynskja tískil eisini at gista sama stað.

Sambært Smyril Line, er ferðamálið hjá hesum málbólki ikki Føroyar, men onnur lond á rutuni hjá Norrønu. Smyril Line sær tó stóran møguleika í hesum málbólki, um arbeitt verður miðvíst við marknaðarføring og at menna støðið á tjaldingar- og kampingplássunum í Føroyum. Við hesum er møguleikin til staðar at fáa fleiri ferðafólk at steðga á í Føroyum í eitt longri tíðarskeið[1].

### 1.2.2 Ferðandi í Føroyum

Niðanfyri síggja vit, hvussu talið á innfluttum kampingvognum er vaksið seinastu árini:

| Innfluttir kampingvognar[2] | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
| **Tal á vognum** | 4 | 6 | 15 | 10 | 42 | 60 |

1 Smyril Line

2 Hagstova Føroya: www.hagstova.fo

## 2 Almenn loyvi

Tá farið verður í holt við at gera tjaldingar- og kampingpláss, skal søkjast um loyvi frá viðkomandi kommunu. Er ætlanin at byggja eitthvørt á staðnum - t.d. smáttur ella felagshús við nátthúsi og vaskirúmi - skal eisini søkjast um alment byggiloyvi frá kommununi.

Mælt verður somuleiðis til, at stigtakararnir til tjaldingar- og kampingplássið venda sær til, ella ráðføra seg við viðkomandi stovnar og feløg. Niðanfyri hava vit sett ein lista upp við stovnum og feløgum. Her sæst, hvørjum fráboðast skal / søkjast um loyvi frá, og hvar vit staðiliga tilmæla, at ráðgeving verður fingin frá:

Stovnar, har tað er eitt krav um loyvi / fráboðan:

- **Eigarin** (Privatur ella t.d. Jarðarráðið): Her má kannast, um tað er gjørligt at ogna sær lendið, og um til ber at nýta hetta til tjaldingar- og kampingpláss.
- **Festarin**: Hevur frammanundan nýtslurætt til øki og má tí geva loyvi til at øki verður nýtt til tjaldingar- og kampingpláss.
- **Friðingarnevndin**, har talan er um viðkvom náttúruøki.

**Umhvørvisstovan**: Setir krøv til økið viðv. dálking v.m.[3]

- **Landsverk:** Landverk hevur ábyrgdina av landsvegunum og økjunum við landsvegirnar, harímillum ábyrgdina av ferðslutrygd og íbindingum í landsveg. Landsverk umsitir byggilinjur við verandi og planlagdar vegir fyri at tryggja at øki er tøkt til út- og umbyggingar av landsvegakervinum. Mælt verður til, tíðliga í fyrireikingunum av einum tjaldingarplássi at kanna, um atkomuviðurskiftini kunnu skipast frá landsvegi á ein ferðslutryggan hátt. Vanliga verður formelt loyvi søkt um íbinding í landsveg gjøgnum kommununa.

3 Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd.

Stovnar og feløg, ið mælt verður til at seta seg í samband við:

- **Camping.fo:** Áhugafelagsskapur fyri kampistar í Føroyum. Felagsskapurin hevur nógvar royndir innan kamping bæði í Føroyum og uttanlands og kann veita góð ráð og "sparring".
- **Økisferðavinnufelagið**: Hesi samskipa oftast ferðavinnuna í økinum. Tað hevur tí stóran týdning at fáa hesi við, sum viðspælarar frá byrjan.
- **Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag**: Hevur sjónarmið viðv. umhvørvisvernd, og skilagott er at fáa hesi sjónarmið við frá byrjan, so sleppast kann undan møguligum trupulleikum seinni.
- **Fuglafrøðifelagið**: Kann siga sína hugsan, um neyðugt er at taka serlig atlit at møguligum fuglalívi í økinum (t.d. um eitt stað er eitt serligt klekingarstað hjá ávísum fuglasløgum).
- **Flutningsfeløg** (Smyril Line o.l.): Hesi kunnu verða stórir keyparar av tænastum frá einum tjaldingar- og kampingplássið og liggja tí inni við nógvari vitan um, hvar skilabest er at staðseta eitt tjaldingar- og kampingpláss, og hvørji krøv til góðsku eiga at verða sett.
- **Møgulig rossafeløg o.l**.: Kann hava týdning í ávísum førum, um so er, at hesi feløg hava serligan áhuga í tí økinum, har staðsetingin er ætlað.
- **Møguligir grannar**: Hesir eiga eisini at hoyrast. Um eitt tjaldingar- og kampingpláss verður mett at fáa neiliga ávirkan á eitt grannalag, kann hetta hava við sær eina neiliga byrjan, og í ringast føri føra til, at staðsetingin má broytast.

## 2.1 Kunngerð um tjalding

Galdandi lóggáva í sambandi við tjalding er kunngerð nr. 54 frá 9. juni 1989. Her ásetir landsstýrið við heimild í lóg um umhvørvisvernd, at tjalding bert er loyvd, har nøktandi saniter viðurskifti, nátthús og vaskiumstøður eru. Kommunurnar hava eftirlitið við, at tjalding einans fer fram á støðum, har treytirnar eru loknar. Kommunurnar hava skyldu til at seta upp forboðsskelti, har tjalding vanliga kemur fyri, men ikki er loyvd. Brot á kunngerðina verða revsað við bót.

# 3 Saniter viðurskifti

Tá talan er um saniter viðurskifti á tjaldingar- og kampingplássum, eru ávís krøv, ið skulu lúkast. Hesi eru krøv til nátthús, frárensl, drekkivatn og reingerð.

## 3.1 Nátthús

Á tjaldingar- og kampingplássinum skal vera nátthús og somuleiðis umstøður til at tøma og reinsa ferðarnátthús (turrklosett) og serstakt pláss, har tøming og skoling av spillivatnstanga kann fara fram. Neyðugt er við góðari upplýsing til ferðafólkini viðvíkjandi hesum møguleikum.

Tað er týdningarmikið at hugsa seg væl um, áðrenn avgerð verður tikin um, hvar eitt sokallað útinátthús skal setast, soleiðis at tað ikki dálkar umhvørvið.

Ein hóskandi mongd av nátthúsum og vaskirúmum skulu vera nær við hvønn bygning, har fólk javnan eru. Fyri neyvari lýsing sí fylgiskjal 3.

Á tjaldingar- og kampingplássinum skulu í minsta lagi vera tvey vælútgjørd baðirúm, har annað er ætlað rørslutarnaðum. Umframt hetta, skulu minst tvey nátthús vera til hvørji 100 ferðafólk:

Leiðbeining:

| | |
|---|---|
| < - 100 ferðafólk | 2 nátthús og 2 baðirúm |
| 101 - 200 ferðafólk | 4 nátthús og 3 baðirúm |
| 201 - 300 ferðafólk | 6 nátthús og 4 baðirúm, .......o.s.fr[4]. |

Har kloakk og annað spillivatn ikki verður veitt í kommunalu spillivatnsleiðingina, t.d. úr summarhúsum, skal spillivatnið leiðast umvegis rottanga og beinleiðis á sjógv við góðum vatnskifti[5]. Uppseting av rottanga og útleiðing av spillivatnið skal góðkennast

4 Icelandic Tourist Board: Leiðbeiningarrit um uppbyggingu tjaldsvæða. 2. útgáva, 2006.

5 Alt spillivatn skal reinsast mekaniskt (so sum rottangi ella størri reinsiverk) áðrenn tað verður leitt á sjógv.

av kommununi. Um so er, at frárensl ikki kunnu gerast, ber til at fáa loyvi at brúka sonevnd turrklosett, ið skulu tømast í góðkenda skipan. Tømingin skal verða reglulig soleiðis at turrklosettini altíð virka til fulnar.

Tað finnast ymisk sløg av rottangum, og støddin av rottangunum skal tilpassast tørvin á tjaldingar- og kampingplássinum.

Viðkomandi kunngerðir hesum viðvíkjandi eru kunngerð nr. 54 frá 9. juni 1989 um tjalding og kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur, sum er broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

## 3.2 Drekkivatn

Á tjaldingar- og kampingplássinum skal vera nóg mikið av drekkivatni og góðar umstøður at vaska í. Eisini er neyðugt við góðari vatnveiting til møguligar eldsløkkingar. Til ber at lesa meira um vatnveiting til eldsløkkingar í "Løgtingslóg um eldsbruna o.a."[6].

Við uppseting av vatnbrunnum er neyðugt at tryggja, at drekkivatnið er sunt og reint. Drekkivatnsbrunnar eiga at vera so væl vardir, sum til ber, ímóti uttanífrákomandi dálking. Best er, um vatnbrunnarnir eru avgirdir soleiðis, at hvørki djór ella menniskju sleppa tætt til brunnarnar. Í øðrum londum eru almennar reglur um, hvussu frástøðan skal vera; t.d. er kravið í Íslandi, at henda girðing skal verða í minsta lagi 5 metur frá brunninum. Í Føroyum er góðskan á verandi vatnbrunnum sera ymisk, men arbeitt verður við at gera betringar.

Vatnbrunnarnir eiga at vera gjørdir soleiðis, at teir eru lættir at reinsa. Skilagott er eisini at hava botnventilar soleiðis, at botnfeld móra lættliga kann skolast út henda veg.

6 Brunaumsjón Landsins: *"Løgtingslóg um eldsbruna o.a. nr. 78, 12. juni 1986 við broytingum frá 12. desember 2006"* .

Tað er skylda at boða Heilsufrøðiligu Starvsstovuni frá alt fyri eitt, um vatnið í brunnum ella rørum er dálkað.

Meira um drekkivatn og vatnbrunnar er at finna á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni[7].

### 3.3 Reingerð av felagsøkjum

Tjaldingarplássið skal vera nossligt. Umsjónarfólkið skal syrgja fyri reingerð av felagsøkjunum, og at fólk ganga væl um. Tað skal gerast reint dagliga ella eftir tørvi, og eina ferð um árið skal alt verða gjørt "høvuðsreint".

Gólvið skal verða úr tilfari, sum er lætt at vaska. Útluftingarskipanin skal reinsast og viðlíkahaldast regluliga. Hondbók og tilhoyrandi leiðreglur um reingerð skulu vera atgongiligar til eftirlitið. Bygningar skulu vera væl viðlíkahildnir. Vaskievni skulu vera umhvørvisvinarlig. Ynskiligt er, at vaskievni hava viðurkendar umhvørvisgóðkenningar, t.d. norðurlendska Svanamerkið ella ES blómuna.

## 4 Náttúra og umhvørvi

Umráðandi er at ganga væl um náttúru og umhvørvið. Standa øll saman um at verja náttúruna, eru vit øll við til at tryggja, at fólk eisini kunnu njóta okkara serstøku náttúru í framtíðini.

### 4.1 Leiðreglur fyri vernd av náttúruni

Til at verja um náttúruna eiga leiðreglur um atburð í náttúruni at vera sjónligar á tjaldingar- og kampingplássinum. Týdningarmikið er, at tey, ið vara av plássinum, eru við í at tryggja, at fólk halda leiðreglurnar um atburð í náttúruni. Hetta kann t.d. gerast við uppsløgum, har dentur verður lagdur á fylgjandi:

7 Heilsufrøðiliga Starvsstovan: www.hfs.fo

- At farið verður frá á sama hátt, tú ynskir tað skuldi sæð út, tá ið tú kemur til staðið
- At burturkast verður tikið upp og koyrt í ruskspannir
- At ognarrætturin skal virðast, og at væl verður gingið um hegn og portur
- At djóralívið verður virt
- At einans verður koyrt við akførum har vegur er
- At einans verður gingið eftir uppmerktum gøtum
- At svørðurin ikki verður brendur, tá t.d. steikt verður á grill
- At tað ikki er loyvt at kynda bál á plássinum
- At vandamikil evni ikki mugu verða stoytt í áir, vøtn ella á sjógv

Tað er oftast so, at tá ferðafólk fáa at vita, hvørjar reglur eru galdani, og at hesar skulu haldast, so vilja tey eisini fegin góðtaka, at eftirlit er við hesum.

## 4.2 Burturkast

Tað er sera umráðandi, at ferðafólkini sleppa av við burturkastið á staðnum. Burturkast frá ferðafólki á tjaldingar- og kampingplássum er at rokna sum burturkast frá húsarhaldi og skal skiljast soleiðis:

- Pappír og papp. Tað er reint pappír og tunt papp.
- Burturkast at brenna. Tað er alt annað vanligt burturkast frá húsarhaldi.
- Serliga dálkandi ella vandamikið burturkast. Tað er sera týdningarmikið at hava eina væl skipaða burturbeining av gassfløskum og øðrum eldfimum burturkasti. Leivdir av serliga dálkandi tilfari skulu vera í hóskandi íløtum. Tað er umráðandi, at íløtini eru væl merkt, so eingin ivi er um, hvat er í. Best er, um evnislýsing við vandaupplýsing fylgir við íløtunum

Burturkast skal vanliga goymast uttandura á brunaliga tryggum staði í minsta lagi 5 metrar frá veggi og húsum og skal vera stikað inni. Um burturkast verður goymt inni,

eru serlig krøv til rúmið, har burturkastið verður goymt. Fyri neyva lýsing av krøvunum til rúmið sí *"Kunngerð um brunaverju og brunatrygd, kap. 4 22.3."* [8].

Sjónlig frágreiðing um, hvussu burturkast skal skiljast, eigur at verða á staðnum.

Tjaldingar- og kampingpláss í Tórshavnar Kommunu skulu venda sær til Kommunalu Brennistøðina, á Hjalla, Hoyvík, viðvíkjandi heinting av burturkasti. Onnur tjaldingar- og kampingpláss skulu venda sær til IRF, Hagaleiti, Leirvík[9]. Hetta er eisini galdandi, tá tað snýr seg um reinsing av saniterum skipanum.

## 5 Býtið av tjaldingarplássum

Fyri at kunna bjóða eina góða tænastu og uppliving er neyðugt við ymiskum sløgum av tjaldingar- og kampingplássum. Ynskiligt er, at eitt høvuðstjaldingarpláss á høgum støði er í miðstaðarøkinum og annars góð tjaldingar- og kampingpláss á hvørjum høvuðsøki í Føroyum. Talan er um vælútgjørd pláss, sum skulu lúka flestu krøv viðvíkjandi hentleikum, møguleika fyri uppihaldi, frítíðarítrivi, matgerð og góðum vaskiumstøðum. Hesi pláss eiga at vera rímiliga stór og hava pláss til bæði tjøld og kampingvognar.

Fyri at kunna bjóða ferðafólki tjaldingarpláss á høgum støði, ið lúka leiðreglurnar í hesi leiðbeining, er tað týdningarmikið at savna orkuna. Her verður serliga hugsað um kostnaðin í sambandi við íløgu og rakstur. Eitt hugskot kundi verið, at nakrar kommunur í felag valdu eitt stað at gera tjaldingarpláss á, og síðani býttu útreiðslurnar og inntøkurnar sínámillum. Kommunusamskipanin kundi hóskandi fingið ein samskipandi leiklut í tílíkum samstarvi.

Neyðugt er somuleiðis við nøkrum smáum plássum til bæði tjøld og kampingvognar og eisini bara til tjøld. Hesi skulu sjálvsagt eisini lúka áðurnevndu krøv í kunngerð nr.

---

8 Brunaumsjón Landsins: KBB-99, *"Kunngerð um brunaverju og brunatrygd"*. 1999. (www.brl.fo)

9 www.irf.fo og www.torshavn.fo

54 frá 9. juni 1989 um tjalding, sum staðfestir, at tjalding bert er loyvd, har nøktandi saniter viðurskifti, nátthús og vaskiumstøður eru[10].

### 5.1 Sløg av plássum

Ferðafólk, ið velja tjalding sum gistingarmøguleika, eru ikki ein einsháttaður bólkur. Nøkur ynskja kanska at sleppa burtur frá býarumhvørvinum og at vera tætt upp at náttúruni, meðan onnur ynskja at uppliva eitt býar- ella bygdarumhvørvi. Tað er tí ynskiligt, at ferðafólkini fáa høvi at velja ímillum ymisk tjaldingarpláss. Plássini kundu hóskandi verðið bólkað soleiðis:

- Tjaldingarpláss í miðstaðarøkinum
- Smærri, men góð tjaldingarpláss í bygdum ella á oyggjum

### 5.2 Val av staði

Við val av staði til at gera eitt tjaldingar- og kampingpláss er neyðugt at hava fylgjandi í huga:

- Endamál

  Neyðugt er at umhugsa væl, hvat endamálið er við plássinum, og hvør tørvurin er á eini tílíkari tænastu á viðkomandi staði.

- Náttúra og umhvørvið

  Tað er av alstórum týdningi at hava atlit at náttúru og umhvørvi, tá ið staðið til tjaldingarpláss verður valt. Eitt tjaldingarpláss er eitt inntriv í náttúruna og eigur tí at verða lagt har, tað hóskar inn í náttúruna ella - í øllum førum, har tað ger minst skaða á náttúruna. Tí er eisini neyðugt at rudda tjaldingar- og kampingplássið í tíðarskeiðinum, har tað ikki verður brúkt.

10 *Kunngerð nr. 54 frá 9. juni 1989 um tjalding.*

- Vandamikil staðseting:
  Tað sigur seg sjálvt, at tjaldingarpláss ikki eiga at liggja á vandamiklum økjum, t.d. nærhendis forbergum, har vandi kann vera fyri omanlopum, ella á øðrum vandamiklum økjum.

Atlit eiga somuleiðis at verða tikin til møgulig neilig árin á náttúruna. Bygging á einum ávísum staði kann til dømis vera til ampa fyri djóralívið og serstakan gróður á plássinum. Tá tað snýr seg um mentanarligt umhvørvi, er talan um virksemi, ið órógvar gerandisdagin hjá íbúgvunum á staðnum. Við vali av staði til tjaldingar- og kampingpláss skal ansast væl eftir, at tey, ið búgva á staðnum, ikki verða órógvað av fólki, sum búgva nærhendis. Hinvegin skal eisini ansast eftir, at tey, ið búgva á tjaldingar- og kampingplássinum ikki órógva tey, sum búgva nærhendis.
Eigararnir hava skyldu til at gera alt fyri at fyribyrgja heilsuskaðiligum larmi[11].

- Veðurlagið
  Veðurlagið í Føroyum er sera skiftandi alt árið, og tí er neyðugt at velja eitt veðurgott stað. Uttanlands verður ofta plantað rundan um kampingplássið fyri at skapa lívd. Ein annar møguleiki er at byggja ella laga garðar rundan um plássið.

- Undirlendið
  Undirlendið á tjaldingarplássinum skal vera slætt. Tað er týdningarmikið, at økið er væl drenað og tekur væl ímóti vatni. Sí nærri lýsing av krøvum til undirlendið á fylgiskjali 4.

- Innkoyring og ferðslutrygd
  Tjaldingar- og kampingplássið skal vera avbyrgt, og kríatúr skulu ikki sleppa inn á plássið. Undantøk kunnu sjálvandi gerast, um plássið liggur úti í náttúruni, langt burtur frá miðstaðarøkinum. Vegirnir rundan um og á

11 Arbeiðseftirlitið: www.arb.fo

tjaldingarplássinum skulu vera væl uppmerktir, og leiðbeiningar um koyring á plássinum skulu vera sjónlig. Økið eigur somuleiðis at vera atkomuligt hjá sløkki- og bjargingarliðum. Vegur og øki skulu vera soleiðis háttað, at tað er gjørligt hjá sløkkiliðunum at koma fram við neyðugum bjargingaramboðum. Fyri neyvari lýsing av krøvum til sløkki- og bjargingararbeiði, sí *"Kunngerð um brunaverju og brunatrygd, kap. 2, 6.2"*[12].

Hugsast má eisini um ferðslutrygd við fyrireiking av økinum. Hædd má takast fyri øktu ferðsluni á vegakervinum í økinum orsakað av tjaldingarplássinum. Vegir, íbinding og atkomuviðurskiftir annars mugu skipast soleiðis, at økið er ferðslutrygt og kann bera væntaðu ferðsluna. Við atliti at trygd á sjálvum tjaldingarplássinum, er skilagott at býta tjaldingarplássið upp, soleiðis at kampingvognar eru á einum staði og tjøld á einum øðrum.

- <u>Staðseting</u>
  Har plássið er tætt við miðstaðarøkið, er ynskiligt, at aðrar tænastur og undirhald liggja tætt við, helst í eini frástøðu so til ber at ganga upp á rímiliga stutta tíð. Her verður hugsað um t.d. søvn, svimjihylar, handlar og matstovur.

# 6 Aðrar tænastur

Ásett er við lóg, at saniteru viðurskiftini skulu vera í lagi á tjaldingar- og kampingplássinum, men tað økir um dygdina á plássinum, um aðrar tænastur eisini eru til staðar, so sum kunning, streymveiting, spælipláss og líknandi.

## 6.1 Neyðug kunning

Leiðreglur á tjaldingarplássinum skulu vera sjónligar, og harafturat eiga upplýsingar um m.a. arbeiðstíð hjá starvsfólki og telefonnummar hjá umsjónarfólki, læknavakt og neyðhjálp at vera sjónligar.

12 Brunaumsjón Landsins: KBB-99, *"Kunngerð um brunaverju og brunatrygd"*. 1999. (www.brl.fo)

## 6.2 Streymveiting

Eitt kampingpláss til kamping- og húsvognar eigur at hava møguleikar til streymíbinding, av tí at hetta er nakað, ið kundarnir oftast rokna við er møguligt.

Tá talan er um streymíbinding, er vert at minna á, at ein lóglig íbinding millum streym-standardir og kampingvogn er ein góðkendur gummikaðal (HO7RN-F 3x2,5 kvadrat), ið er útgjørdur við CEE stikki uttan samlingar, ella leingjarakápli og dósum, soleiðis at streymveitingin er best møguliga vard ímóti vætu.

Streymíbindingin eigur at vera í aftasta (innasta) horninum á einum uppmerktum kampingplássi, og frástøðan til avmerkta støðuplássið eigur at verða minst 2 metrar og í mesta lagi 20 metrar[13].

El-innleggingar mugu einans vera framdar, umvældar, víðkaðar, tiknar niður og heilt ella lutvíst settar til almennu streymskipanina undir ábyrgd og eftirliti av góðkendum el-innleggjara[14].

## 6.3 Spælipláss

Um farið verður undir at byggja eitt spælipláss á tjaldingarplássinum, er neyðugt at hava fylgjandi í huga:

- At hugsa um trygdina hjá børnum og tryggja, at útgerðin á spæliplássinum er gjørd úr góðum tilfari. Spæliplássið skal altíð vera væl viðlíkahildið og væl frágingið.
- Spæliplássið má ikki gerast har, ið børn kunnu verða hótt av umhvørvinum, t.d. ferðslu, omanlopi ella druknivanda.

13 Elektricitetsrådet*: Stærkstrømsbekendtgørelsen, 6. partur, Elektriske installationer*. 2001.

14 Brunaumsjón Landsins: KBB-99*, "Kunngerð um brunaverju og brunatrygd"*, 24-1 – 4. 1999.

- Spæliplássið skal liggja á einum staði, har fólk til gongu ella á súkklu ikki eru ein hóttan fyri børnini.
- Øll ferðsla er bannað á spæliplássinum, uttan so er, at tað er bráðneyðugt t.d. vegna sjúkraflutning ella við uppseting av nýggjari útgerð.
- Gott ljós skal vera á spæliplássinum.
- Um hegn og portur eru á spæliplássinum, skulu hesi verða gjørd soleiðis, at tey ikki eru til vanda fyri børnini.

## 6.4 Smáttur

Ein vanligur og útbreiddur gistingarháttur aðrastaðni er smáttur. Her er talan um smá hús, ið kunnu verða við ella uttan nátthús og køksumstøðum.

Um ætlanin er, at tjaldingar- og kampingplássið eisini skal hava smáttur, skulu hesar sjálvandi altíð vera reinar og væl viðlíkahildnar. Eitt annað krav er, at úthurðin skal ganga úteftir. Smátturnar skulu hava el og góðan møguleika fyri útlufting. Støddin á rúmum og koyggjum eigur at fylgja norðurlendskum mátum[15].

Er ætlanin at bjóða gisting í smáttum saman við rakstri av tjaldingarplássi, skal upplýsast um hetta, tá søkt verður um loyvi frá kommununi um at gera tjaldingarpláss.

## 6.5 Søla

Í sambandi við vinnuligt virksemi á tjaldingarplássinum er neyðugt við serstøkum loyvum. Um ætlanin t.d. er at selja mat á plássinum, er neyðugt við loyvi frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum setir krøv til m.a. útgerð og innaneftirlit.

15 NHO Reiseliv: Nordiske Stjernekrav. 2. útgáva, 1. februar 2008.

# 7 Meting og flokking av tjaldingar- og kampingplássum

Í altjóða høpi verða flokkingarskipanir av tjaldingarplássum ofta nýttar. Ein meting verður gjørd av tjaldingarplássunum, og tey verða síðan flokkað í mun til góðsku og hentleikar á staðnum. Flokkingin inniber, at plássini fáa úr einari stjørnu upp í fimm stjørnur. Hetta er soleiðis við til at tryggja brúkarunum eina góðsku á altjóða støði.

Ferðavinnan í Føroyum eigur at miðja ímóti at gerast partur av einari tílíkari flokkingarskipan. Tað mest náttúrliga vil vera at miðja eftir at gerast partur av norðurlendsku flokkingarskipanini. Fyri at stigtakararnir til tjaldingarpláss skulu hava nakað at meta seg eftir, vísa vit høvuðskrøvini í norðurlendsku flokkingarskipanini í fylgiskjali 5.

## 7.1 Flokking av smáttum

Til at flokka smátturnar verða somuleiðis stjørnur brúktar saman við smáttuteknunum.

Flokkingin inniber á sama hátt sum við tjaldingarplássunum, at smátturnar kunnu fáa úr einari stjørnu upp í fimm stjørnur (sí fylgiskjal 6).

Fyri at vísa á eitt sera vælvirkandi kamping- og tjaldingarpláss, hava vit í fylgiskjali 7 gjørt ein samandrátt av “Hvidbjerg Strand Camping”, ið hevur hægstu flokking (5 stjørnur), og eisini telist millum tey 5 fremstu kampingplássini í norðanlondum.

# 8 Innlating av hagtølum

Tað er sera týdningarmikið, fyri vinnuna sum heild, at hava dagførd hagtøl, soleiðis at til ber at fylgja við gongdini - eisini í ferðavinnuni. Øll, ið bjóða gisting í Føroyum, skulu tískil senda hagtøl til Hagstovu Føroya einaferð um mánaðin. Eitt skjal skal útfyllast við upplýsingum um, hvussu nógvum gestum rúm er fyri, upplatingartíðir, tal av gestum, hvaðani teir eru (tjóðskapur) og yvirnáttingar o.s.fr.

Vert er at minna á, at Hagstova Føroya hevur myndugleika til at krevja at fáa hagtølini inn. Tað er tí ein skylda at veita tey hagtøl, ið biðið verður um. Fyri at gera tað lætt at gera hesi hagtøl, verður mælt til, at tey, ið reka plássini, skráseta neyðugu upplýsingarnar um gestirnar longu við móttøku, eins og vanligt er í hotellvinnuni. Verður hetta gjørt, er helst eingin trupulleiki at veita hagtølini, tá biðið verður um tey.

Eitt dagført yvirlit yvir tjaldingar- og kampingplássið (støðd, hentleikar, upplatingartíðir o.s.fr.) eigur somuleiðis at verða sent SamViti einaferð um árið (í februar mánaði). Hetta fyri at tryggja, at upplýsingarnar á heimasíðuni hjá SamViti viðvíkjandi tjalding og kamping í Føroyum altíð eru eftirfarandi.

# 9 Niðurstøða

Henda leiðbeining vísir á viðurskifti, ið hava týdning fyri at kunna lyfta kamping- og tjaldingarplássini í Føroyum upp á eitt hægri støði, svarandi til tað í londunum rundan um okkum.

Fyri at røkka hesum máli, eigur henda leiðbeining at verða nýtt, tá stig verða tikin til at gera tjaldingarpláss. Sum áður nevnt, hevur tjalding í sær sjálvum ikki víst seg at vera ein beinleiðis lønandi vinna og er tískil meira at rokna sum ein tænasta, ið serliga kommunur veita ferðafólki. Henda tænasta er tó av stórum týdningi, tá hugsað verður um, hvussu nógv vánalig umrøða av tjaldingarplássum í Føroyum kann skaða ferðavinnuna sum heild.

Vantandi góðska á okkara tjaldingarplássum og ólóglig tjalding er samstundis við til at dálka okkara vøkru náttúru, og tí mugu vit koma burtur úr lappaloysnum og arbeiða fram ímóti eini miðvísari savnan av orkuni og gera nøkur fá og góð tjaldingarpláss í Føroyum. Samstarv er lyklaorðið. Kommunusamskipanin kundi hóskandi fingið ein samskipandi leiklut í tílíkum samstarvi.

Við einum alsamt vaksandi tali av ferðafólki, ið brúka tjalding sum ferðarhátt, og eini ferðavinnu í støðugari menning, er grundarlagið til staðar til at gera tjaldingarpláss runt um í Føroyum. SamVit mælir í hesum sambandi til:

- At kommunur og einstaklingar savna orkuna og gera nøkur fá og góð tjaldingar- og kampingpláss í Føroyum.
- At myndugleikar og vinna, so sum flutningsfeløg, samstarva um gerð av hesum plássum.
- At atlit verða tikin til náttúru og umhvørvið, og at plássini eru so umhvørvisvinarlig sum gjørligt.
- At Føroyar gerast partur av norðulendsku flokkingarskipanini, tí hetta fer at gera arbeiðið munandi léttari - bæði hjá veitarum, ferðandi og myndugleika.

Verða tilmælini í hesi leiðbeining fylgd, og tað eydnast at fáa samstarv millum einstaklingar, kommunur, vinnu og feløg um gerð av tjaldingar- og kampingplássum á altjóða viðurkendum støðið, so kann væntast, at grundarlagið fyri einum munandi vøkstri hjá tí málbólkinum, sum nýtir hetta slag av gisting, verður til staðar. Hetta gevur so aftur grundarlag fyri, at vinna og myndugleikar kunnu samstarva um at marknaðarføra Føroyar sum eitt áhugavert tjaldingar- og kamping ferðamál. Í síðsta enda kundi hetta havt við sær, at Føroyar gerst sjálvt ferðamálið, og ikki bert ein stuttur steðgur á leiðini.

# Kelduyvirlit


1. Arbeiðseftirlitið: www.arb.fo

2. Akstovan: www.akstovan.fo

3. Brunaumsjón Landsins: www.brl.fo

4. Elektricitetsrådet: *Stærkstrømsbekendtgørelsen, 6. partur, Elektriske installationer*. 2001.

5. Estates Department, the Camping and Caravanning Club Coventry: *Standard Details Manual.*

6. Ferðaráð Føroya: *Bóklingur um Skelting, Nátt- og tvátthús, Dvalavikar og Tjalding.* Tórálvur Weihe lagt til rættis. 2001.

7. Fundarfrásøgn Samvit: *Fundur viðvíkjandi tjald- og kampingplássum í Føroyum*. 18. januar 2008

8. Hagstova Føroya: www.hagstova.fo

9. Heilsufrøðiliga Starvsstovan: www.hfs.fo

10. Hvidbjerg Strand Kamping: www.hvidbjerg.dk

11. Icelandic Tourist Board: *Leiðbeiningarrit um uppbyggingu tjaldsvæða.* 2. útgáva, 2006.

12. Kunngerð nr. 54 frá 9. juni 1989 um tjalding.

13. Lógarsavn: www.logir.fo

14. Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd.

15. NHO Reiseliv: *Nordiske Stjernekrav*. 2. útgáva, 1. februar 2008.

16. Økisferðavinnufelagið í Eysturoynni: *Økisferðavinnuætlan fyri Ferðavinnuna í Eysturoy*. 2005-2006

# Fylgiskjøl

## Skjal 1: Trygdarviðurskifti

Endamálið við spurnarblaðnum er, at hjálpa veitarum at lúka ásett krøv.

| **Tjaldingar- og kampingpláss** | **Ja** | **Nei** |
|---|---|---|
| Er støðuplássið til kamping- og húsvognar innigirt? | | |
| Er tømingarstað til ferðanátthús og spillvatn á plássinum? | | |
| Er møguleiki fyri áfylling av reinum vatni á plássinum? | | |
| Er náttarvakt á staðnum? | | |
| Er neyðtelefon á staðnum? | | |
| Eru eldstøð og sløkkiútgerð á staðnum? | | |
| Er bummur fyri inngongdina til plássið? | | |
| Er bjargingarútgerð á staðnum? | | |

| **Køkur** | **Ja** | **Nei** |
|---|---|---|
| Er í minsta lagi ein 5 kg CO2 eldsløkkjari ella ein 6 kg pulvur eldsløkkjari í køkinum? | | |
| Er brandteppi í køkinum? | | |
| Eru knívar, saksar og onnur hvøss amboð goymd fyri børnum? | | |
| Eru vaskievni og onnur vandamikil evni goymd í goymslum við barnatrygd? | | |
| Eru kontaktir/el-tól, sum børn røkka? | | |
| Stendur komfýrurin við veggin? | | |
| Gerst hurðin á ovninum heit, tá ovnurin er tendraður? | | |
| Er trygdarlás á ovnhurðini? | | |
| Eru pláturnar á komfýrinum vardar, tá ovnurin er tendraður? | | |

| **Grill** | **Ja** | **Nei** |
|---|---|---|
| Er gott undirlag at seta grillina á? | | |
| Er grillin føst/innbygd? | | |
| Er grillkolið/veskan goymd á tryggum staði? | | |

| **Reingerð** | **Ja** | **Nei** |
|---|---|---|
| Er sápan til vaskimaskinuna goymd í løstum skápi? | | |
| Eru hitastýrd blandingsbattarí á brúsunum? | | |
| Er skammil til børn við vaski í baðirúminum? | | |
| Er skriðmátta í baðikari ella brúsu? | | |

| El | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Er el-arbeiðið gjørt av góðkendum el-innleggjara? | | |
| Eru el-avbrótarar á plássinum, og eru hesir í lagi? | | |

| Spælipláss | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Eru meira enn 12 cm millum rimarnar, um rimaverk er á spæliplássinum? | | |
| Lýkur spæliplássið trygdarkrøvini í tjaldingarvegleiðingini? | | |

| Annað | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Er sjónvarpið fast á eini hill ella á einum borði, sum stendur upp móti vegginum? | | |
| Eru vandamiklar hurðar, sum klamsa, tá tað er gjóstur? | | |
| Er brunateppi, eldsløkkjari, roykalarmur til staðar? | | |
| Er sløkkivatn og/ella onnur sløkkiútgerð á plássinum (umframt í køkinum)? | | |
| Er nummarið á neyðhjálp/sløkkiliði sjónligt á viðkomandi støðum? | | |

## Skjal 2: Krøv til nátthús

Nátthúsið skal vera umleið 1,2 $m^2$ til støddar, og nátthús til rørslutarnað í minsta lagi 3,3 $m^2$. Hondvask við heitum og køldum vatni og tilhoyrandi vaskievni skal vera í rúminum ella í rúminum við síðuna av. Ruskspann við loki skal vera í hvørjum nátthúsi. Har, ið skilaveggirnir millum nátthúsini ikki koma niður á gólv og upp til loft, skulu nátthúsini vera býtt sundur til kvinnur og menn[16].

Nátthúsini og forhøllin skulu vera gjørd úr tilfari, sum er lætt at halda reint. Nøktandi útlufting og ljós skal vera í rúminum. Hurðin út frá nátthúsinum má ikki ganga beinleiðis út í rúm, har matur verður tilgjørdur.

16 Icelandic Tourist Board: *Leiðbeiningarrit um uppbyggingu tjaldsvæða*. 2. útgáva, 2006.

## Skjal 3: Krøv til lendið

Undirlendið er sera ymiskt frá staði til stað, men krøv til undirlendið eiga at vera galdandi uttan mun til, hvar í Føroyum tjaldingar- og kampingpláss verða gjørd. Um talan er um nýbygging, er neyðugt at planera økið. Best er at grava økið upp, harva og koyra grótið burtur. Tað er umráðandi, at økið er væl drenað, so at vatn setir væl frá.

Føroyska undirlendið er sera bleytt orsakað av váta veðurlagnum, og tí kann vera neyðugt at asfaltera undirlendið, ið er ætlað til kamping- og húsvognar.

Um økið skal brúkast til bæði kampingvognar og fortjøld, mælir Camping.fo til, at vognurin stendur á asfalti og fortjaldið á grasvølli. Her er umráðandi, at hallið ikki er meira enn 1 cm fyri hvønn metur.

## Skjal 4: Heiti á teknum

| | |
|---|---|
|  Brúsa |  Nátthús til rørslutarnað |
|  Spælipláss |  Tømistað |
|  Nátthús |  Sjónvarpstova |
|  Puslirúm |  Møguleiki at vaska upp |
|  Vaskimaskina |  Turkitrumla |
|  Uppihald/fundarrúm |  Gjaldskort |
|  Nátthús og vask í einum rúmi |  Planerað |
|  Baðirúm til familju |  Skolikumma |
|  Frárensl / spillvatn |  Mikroovnur |
|  Hárturkari |  Nátthús og bað |
|  Hondvask |  Minibað |
|  Uppvaskimaskina |  Gott jarðarstykki |
|  Avbyrgdur bummur |  Ovnur |
|  Parabol |  Internetcafé |

## Skjal 5: Flokking av tjaldingar- og kampingplássum



- Eitt ábyrgdarfólk skal hava dagligt eftirlit á tjaldingarplássinum
- Ein talva við upp- og afturlatingartíðum, flokking, leiðreglum, brunatrygd, prísum og neyðhjálp skal vera á staðnum
- Heitt og kalt vatn skal vera í brúsu og vaski
- Øll VHS (vatn, hiti, sanitet) útgerð skal vera undir taki
- Gott ljós skal vera í øllum bygningum
- Atgongd skal vera til at matgera undir taki
- Innkoyringin skal vera væl uppmerkt og skeltað við upp- og afturlatingartíðum
- Vegirnir inni á tjaldingarplássinum skulu vera í góðum standi
- Gott ljós skal vera við innkoyringina
- Minst ein fyrstahjálparkassi skal vera til taks
- Allir bygningar skulu vera viðlíkahildnir og reinir

Umframt:  (skjal 4)



Umframt nevndu krøv, skulu fylgjandi hentleikar vera á staðnum fyri at fáa 2 stjørnur:

- Kort yvir eldsløkkingarútgerð skal vera á staðnum
- Móttøkan skal vera væl skeltað og liggja miðskeiðis á tjaldingarplássinum

Umframt: 



Umframt nevndu krøv, skulu fylgjandi hentleikar vera á staðnum fyri at fáa 3 stjørnur:

- Eftirlit skal vera alt samdøgrið

- Eitt yvirlit skal vera yvir virksemi, upplivingar og vitjunarverd støð, sum eru í økinum
- Sjálvstøðugur køkur við øllum hentleikum
- Møguleiki fyri at fara til handils skal vera nærindis
- Alt økið skal vera avbyrgt, soleiðis at óviðkomandi hava avmarkaða atgongd
- Plássini skulu vera talmerkt og avmerkt
- Eitt øki skal vera, sum hevur pláss fyri borðum, stólum, súkklustativum og atgongd til streym
- Innkoyringin skal vera stongd frá kl. 23.00 - 07.00
- Ljós skal vera yvir alt økið
- Spæliplássið skal vera innigirt

Umframt: 

★★★★

Umframt nevndu krøv, skulu fylgjandi hentleikar vera á staðnum fyri at fáa 4 stjørnur:

- Móttøkan skal vera opin frá kl. 08.00 - 20.00
- Handil ella kiosk skal vera á tjaldingarplássinum
- Eitt stað, har tú kanst keypa mat, skal ikki vera longri burtur enn 3 km
- Ruskbingjur skulu vera á avbyrgdum ruskplássi

Umframt: 

★★★★★

Umframt nevndu krøv, skulu fylgjandi hentleikar vera á staðnum fyri at fáa 5 stjørnur:

- Eitt ábyrgdarfólk vera á staðnum alt samdøgrið

- Móttøkan skal vera í sjálvstøðugum rúmi
- Sjónvarpsstova
- Innandura spæli- og aktivitetsrúm til børn
- Handil skal vera á staðnum
- Ein matstova skal ikki vera longri burtur enn 1 km

Umframt: 

Nevndu hentleikar finnur tú, sum áður nevnt á tjaldingar- og kampingplássum, ið eru flokkað. Nógv tjaldingar- og kampingpláss bjóða fleiri hentleikar enn tey, ið nevnd eru í høvuðskrøvunum, bæði tá tað snýr seg um tænastu og virksemi. Meira kann lesast um norðurlendsku flokkingarskipanina á http://www.camping.no/klassifisering.html ella á http://www.campingraadet.dk/

## Skjal 6: Flokking av smáttum

★

- Eitt rúm við vanligum innbúgvi skal vera í smáttuni

★★

Umframt nevndu krøv, skulu fylgjandi hentleikar vera fyri at fáa 2 stjørnur:

- El (ljós, hiti, køliskáp, kókipláta osfr.)
- Fleiri rúm kunnu vera í smáttuni

★★★

Umframt nevndu krøv, skulu fylgjandi hentleikar vera fyri at fáa 3 stjørnur:

- Atskilt sovikamar
- Vatn

★★★★

Umframt nevndu krøv, skulu fylgjandi hentleikar vera fyri at fáa 4 stjørnur:

- Heitt og kalt vatn
- Nátthús og brúsa
- Steintoy, grýtur osfr.
- 1 stova/køkur
- Í minsta lagi 1 sovikamar

★★★★★

Umframt nevndu krøv, skulu fylgjandi hentleikar vera fyri at fáa 5 stjørnur:

- Hotellstøði við hentleikum so kundin sjálvur kann gera mat (12)

## Skjal 7: Dømi um tjaldingar- og kampingpláss á hægsta stigi

Hvidbjerg Strand Camping er eitt 5 stjørnað tjaldingar- og kampingpláss, ið eisini fevnir um útleigan av 5-stjørnaðum smáttum. Staðið bjóðar eina røð av frítíðarvirksemi til alla familjuna – uttan mun til veður. Plássið liggur við eina sandstrond, og hetta ger sjálvandi staðið til nakað heilt serligt. Afturat baðimøguleikum á og við strondina bjóðar staðið eisini eitt innandura baðiland, sum serliga er ætlað familjum.

Staðið bjóðar millum annað:

- 5-stjørnað kamping- og tjaldingarpláss (sí skjal 5)
- 5-stjørnaðar smáttur (sí skjal 6)
- Matstovu
- Góð spælipláss til børnini
- Innandura tropiskt baðiland
- Tráðleyst internet
- Útleigan av súkklum og bátum
- Heitt vatn og brúsa í øllum smáttum, umframt felagsøki við somu hentleikum.

Lýsingin omanfyri vísir, at hetta staðið hevur enn meira enn tað, sum krevst fyri at fáa 5 stjørnur. Staðið telist tí eisini millum 5 tey fremstu tjaldingar- og kampingplássini í norðanlondum.

Tá hugsað verður um baðiland o.l. má metast, at vit í Føroyum eiga at hugsa um verandi fasilitetir, og leggja tjaldingar- og kampingpláss nærindis hesum fasilitetum, soleiðis at hjávinningurin fyri eitt slíkt stað gerst so góður sum gjørligt.

Fá meiri at vita um Hvidbjerg Strand Kamping, sí www.hvidbjerg.dk.